## Fylgiskjal 1

| Mannagongd fyri fremjan av námsfrøðiligum eftirliti, sambært Kunngerð nr. 226 frá 20. desember 2020 um námsfrøðiligt eftirlit | |
|---|---|
| **Ábyrgdari** | **Uppgáva** |
| **AMMR** | Uppgávan verður boðin út sambært galdandi reglum.<br><br>Veitarar, ið ynskja at átaka sær uppgávuna, senda eitt tilboð til AMMR, og geva í hesum sambandi AMMR eina kostnaðarmeting, ið nágreinar:<br>- Kostnaðin fyri at fremja sjálvt eftirlitið (løn)<br>- Kostnaðin fyri praktisk viðurskifti (ferðing, leiga bil, hotell o.a.) |
| **AMMR*[1]**<br>*AMMR ger eitt uppskot, ið verður tillagað í samráð við veitaran.* | Eftirlitið verður avtalað við veitaran, ið skal fremja eftirlitið.<br>Partarnir undirskriva avtalu, har kostnaðurin fyri arbeiðið er avtalaður.<br><br><u>Avtalan nágreinar harumframt:</u><br>- Lógargrundarlag fyri eftirlitinum<br>- Hvørji tilboð og tænastur eftirlitið fevnir um<br>- At talan er um fráboðað eftirlit<br>- Tíðarskeiðið eftirlitið verður framt<br>- Leist<br>- Ábyrgdarbýti<br>- Praktisk viðurskifti |
| **AMMR** | AV[2] verður kunnað um eftirlitið, harundir:<br>- Heimildargrundarlag<br>- Hvat eftirlitið fevnir um<br>- Hvat tilfar veitarin hevur tørv á<br>- Nær eftirlitið verður framt<br>- Hvussu tey, borgarar og avvarðandi kunnu seta seg í samband við veitaran um eitthvørt<br><br>Eitt kunningarskriv til avvarðandi og borgarar verður sent til AV. AV sendur skrivi til tilboðini, ið hava ábyrgd av at kunna borgaran og avvarðandi. |
| **Veitarin** | Viðkomandi tilfar verður fingið til vega frá AMMR og AV. Veitarin avtalar við AV hvussu samskift verður millum eftirlitsfólkið og AV um praktisk viðurskifti og spurningar annars. |
| **Veitarin** | Eftirlitið verður framt.<br>Eitt umboð frá AMMR skal hava møguleika fyri at vera við sum eygleiðari. |
| **Veitarin** | Uppfylgjandi spurningar frá eftirlitsvitjanini verða sendir til AMMR og AV. |
| **Veitarin** | Eitt fyribils avrit av eftirlitsfrágreiðingunum verður sent til AMMR, ið kannar fakta og um frágreiðingarnar er nøktandi navnleysar. |
| **Veitarin** | Eitt navnleyst uppskot til eftirlitsfrágreiðingar verður sent til AV, ið kannar um faktuellir feilir eru og ger viðmerkingar til tilmælini frá eftirlitinum. |
| **Veitarin** | Endaligu frágreiðingarnar verða sendar til AMMR, saman við einum uppskoti til samandrátt, ið kann leggjast út alment. |
| **AMMR** | Eftirlitsfrágreiðingarnar verða sendar til AV, møguligum borgararáði og ráð fyri avvarðandi og avvarðandi áhugafelagi í seinasta lagi 6 mánaðir eftir vitjanina. |
| **AMMR** | Ein samandráttur av eftirlitsfrágreiðingunum verður lagdur á heimasíðuna hjá AMMR. |
| **AMMR** | Verður í eftirlitsfrágreiðingini staðfest, at tørvur er á ábótum, kann landsstýrisfólkið áleggja AV, innan fyri eina nærri ásetta freist, at seta neyðug tiltøk í verk fyri at bøta um umstøðurnar. |

[1] Almanna- og mentamálaráðið
[2] Almannaverkið